# Matrikul- ella landmátingarteknikari / hjálparfólk

*Matrikul- ella landmátingarteknikari / hjálparfólk.*

Okkum tørvar fólk at hjálpa við uppmátingum, sakarviðgerð og øðrum arbeiði í sambandi við umsiting av matriklinum og við útskiftingum.

Hetta er áhugavert arbeiði úti og inni við avbjóðingum, bæði tøkniliga og fyrisitingarliga.

**Førleiki**

- Prógv sum landmátingarteknikari, tekniskur assistentur, miðnámsútbúgving ella líknandi
- Góðan teldukunnleika
- Góð samstarvsevni

Tú gerst bert fullgóður starvsfelagi við teimum royndum, sum starvið sjálvt gevur, men møguleikarnir fyri supplerandi skúlagongd og víðari lestri eru fleiri.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fyrispurningar**
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til:
Bjarna Hansen, deildarleiðara, telef. 342419, 342400 ella bjarnih@us.fo

Umsókn, saman við prógvum, CV og møguligum viðmælum, skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 30. juli 2008.

**Umhvørvisstovan**
Lendi
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvismál og viðarvøkstur og frílendir.*

sansir.fo

STARVSLÝSING

## Skrivstovufólk

Landsverk søkir eftir einum skrivstovufólki til starvsfólkadeildina. Starvsfólkadeildin varðar av starvsfólkarøkt, skrivstovuumsiting og aðrari umsiting.

**Arbeiðsøkið**
Tú fært ábyrgd av øllum móttøkuuppgávum og innanhýsis tænastum. Harumframt verður tú við í øðrum arbeiðsuppgávum á deildini.

**Førleikakrøv**
Tú hevur skrivstovuútbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndir.

Tú sýnir eisini tænastusinni, nærlagni og ágrýtni, ert fyrikomandi og dugir væl at málbera teg. Tú hevur teldukunnleika á brúkarastigi. Upplæring í serskipanum verður givin á staðnum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juli kl.12.00. Merk umsóknina „Umsókn til Starvsfólkadeildina" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Elsu Johonnu Høgenni, starvsfólkaleiðara, á 340 800 ella ejh@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*


## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?





## Útbering av dagbløðum og reklamum



**LEYST STARV**

Vit søkja eftir fólki at bera bløð út á

**Hósvík**

Ert tú 13 ár ella eldri, og hevur hetta tín áhuga, so ring á **tel 35 14 05** frá kl. 10 - 17 ella send ein teldupost: **utbering@prent.fo**

**Prentmiðstøðin**

Smyrilsvegur 13 · Postboks 3314 · 110 Tórshavn
tel 34 14 00 · Útbering tel 35 14 05 · Fax 35 14 01
utbering@prent.fo · www.prent.fo